# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Sitat úr onkrum blaðið ella sum onkur hevur sagt íð er við í einari grein hjá okkum í dag ella ein stuttur stu*

*Xxxxxxx Xxxxxxxx um okkurt*

## Ein gleðistíð

Hetta er einki minni enn ein gleðistíð fyri tey flestu av okkum. Summarið er komið, tó at vit mugu sláa okkum til tols við eisini at liva við regni og mjørka. Men eftir drúgvan vetur við kulda og kava skifta vit bráddliga ham. Og orsøkirnar til tess eru so nógvar.

Ljósið og hitin eru líkasum tey, ið rudda slóð. Í kjalarvørrinum á teimum síggja vit fyrstu fremmandafólkini í gøtunum. Fyrstu risastóru ferðamannaskipini við Molan í Havn eru eisini eitt hitt fyrsta summartekinið. Men eisini smáu og snøggu seglbátarnir í Vágsbotni bera boð um, at summarið er komið. Teir seta sín serstaka altjóða dám á tað annars so livandi og hugnaliga umhvørvið í hjartanum á Føroyum.

Men tær fyrstu pisurnar, teir hundraðtals føroyingarnir, sum eftir drúgva útbúgving loksins frá prógv, bera eisini boð um, at summarið er komið. Vøkru húgvurnar, sum symbolisera lærdóm, lív og gleði, síggjast kring alt landið og eru tær kanska tað summartekinið, ið vit øll fegnast mest um. At okkara ungdómur útbúgvir seg til sína egnu framtíð men eisini til framtíðina hjá hesi lítlu tjóð úti í Atlantshavi.

Vit ynskja øllum teimum, sum hava lokið prógv við mongu skúlarnar kring landið, hjartaliga tillukku og góða eydnu víðari. Vit ynskja eisini mongu summargestunum vælkomnum og vit ynskja føroyingum, sum fara at ferðast heima sum burturi hetta summarið góða feriu.

**Sosialurin**

# SAVE THE WHALE

**JOHAN MORTENSEN**



So byrjaði cirkussið aftur. Fundur hevur verið í IWC, altjóða hvalanevndini, og til alla ólukku hava tær tjóðirnar sum aftur vilja fara undir kommerciella hvalaveiðu nú fingið Danmark í sin part. Tað er sera hugstoytt at Danmark er farin í bólkin sum vil loyva hvalaveiðu, kallið tað so ryndarveiðu ella líknandi møsn.

Danmark mátti annars havt nóg mikið at hugsa um. Fyrst hava nakrir blaðteknarar chikanerað allar heimsins muslimar og nú fara danir gud-hjálpi-túmær eftur hvalunum. Tey túsundtals mótmælini sum Danmark longu hevur fingið tosa sít týðuliga mál, nevniliga at heimsins borgarar vilja verja hvalin, henda ediliga Guds skabning sum nær varð oyddur av ránsveiðu.

Tað eru ongi haldgóð argument fyri aftur at fara undir ótespuliga, handilsliga stórhvalaveiðu og tað verður gitað at Japan hevur mutrað litlar Stillahavstjóðir í IWC at atkvøða fyri hvalaveiðu.

Somuleiðis kann ein spyrja hvørji føroysk áhugamál danska stjórnin umboðar í hesum máli.. Allarhelst er tað bert eitt sera lítið fátal av føroyingum sum í álvara tosa sum hvalaveiðu. Flestu føroyingar duga at síggja tað neyðuga í at verja hesi seinastu súgdjór havsins. Okkum tørvar ikki stórhvalaveiðu, so einfalt er tað, tíðin er farin frá hesari vinnu eins væl og nósavinnuni.

Vit tosa um visiónir og alheimsgerð og etik og moral og alt gott um tað, men vit hava sanniliga okkara globalu ábyrgd av at verja hvalin. Við okkara tvassi um stórhvalaveiðu øsa vit enn einaferð heimsopiniónina ímóti okkum og fara vit til endans at spæla av við grindadrápið og skaða okkara útflutning og ferðamannavinnu. Vit verða flokkaði millum tær dubiøsu tjóðirnar sum ikki virða hvalir og náttúru.

Hetta er sera álvarsamt og eg fari at heita á føroyingar um at fara inn á heimasíðurnar hjá góðum felagsskapum sum GREEN PEACE og FRIENDS OF THE EARTH og gera vart við at føroyingar verja stórhvalin og ikki taka undir við donsku støðutakanina.

Vit eru ein tjóð sum hvørki góðtekur KYOTO ella SEITES avtaluna um handil við hóttum djórasløgum. Nær verða vit føroyingar ábyrgdarfullir heimsborgarar og sum verða tiknir í álvara sum Tjóð?

Men kanska er tað her sum hundurin er jarðaður. Eru vit ein Tjóð ella bert eitt hjáland sum ikki vil taka ábyrgd av egnum landi. Skulu vit framhaldandi vera “the underdog of the north atlantic”heldur enn at teljast millum javnlíkar í ST, EU,WTC og øðrum fora har heimspolitikurin verður evnaður til.

# Nú eiga klokkurnar at ringja!

**RANDI Í JÓGVANSTOVU**



Og tað hart eisini. Tað, at Jørgen Niclasen kemur út úr skápinum og sigur, at vit eiga at áleggja vinnuni skatt í samband við sølu av skipum við fiskiloyvum, er vindandi galið. Ein fólkafloksmaður sum hann sigur einans hetta, um hann sær eitthvørt slag av vinningi fyri framman.

Og tann optimali vinningurin vil í hesum føri vera ein lóggáva sum ger tað lógligt, at teir, ið hava fingið fiskiloyvini, eisini sambært lóg eiga hesi loyvini. Tey verða sostatt eisini “ogn føroya fólks”.

Tá so landsins myndugleikar ynskja at regulera í fiskiskapinum við at draga inn aftur loyvir ella á annan hátt stýra fiskiskapinum, kanska orsakað av ovfisking ella øðrum, koma risastór endurgjaldskrøv frá hesum, sum jú eiga fiskiloyvini.

Hesi fiskiloyvini, sum teir fingu fyri einki skulu teir nú hava endurgjald fyri bæði tví –og trýfalt.

Nei nú má vend koma í. Fiskiloyvini eiga at fylgja skipunum, ið hava biðið um og fingið tey. Tá skipini ikki longur gera nýtslu av loyvunum, skulu hesi latast innaftur. Sjálvsagt skal eitthvørt avgjald ella ein tilfeingisrenta av einumhvørjum slagi leggjast á tann, ið fær loyvini. Hetta er ikki meira enn rímiligt.

Hetta óskilið hevur valdað alt ov leingi, nú má skil fáast á.

# Er Hans P. Strøm, landsstýrismaður besettur?

**JOHN SIGURD JOENSEN**

Tann 12. juni 2006 setti eg H. P. Strøm nakrar spurningar í Sosialinum um ferðaendurgjald fyri tey sjúku, sum búgva uttan fyri Havnina. Nú 22. juni 2006 er einki svar komið. Tað kann aldrin vera rætt, at tey sjúku uttan fyri Havnina skulu gjalda eykaskatt fyri at fara til serlækna. Teir ráðandi kunnu aldrin hava loyvi til at seta eina lóg í gildi, um bert rakar tey sjúku uttan fyri Havnina, tað vil siga, ein bólk av teimum sjúku, og tað er sanniliga ikki teir lítlu pengarnir, teir taka (jú fyri teir), men ikki fyri tey sjúku. Allir serlæknar eru í Havn, hví ikki bara taka alt til Havnar og so kunnu tey ríkikeypa allar útoyggjar til feriupláss, tit hava pengar til tað.

Til útoyggjafólk: Um tit vænta nakað sum helst frá teimum ráðandi, kunnu tit gott gloyma alt aftur. men vit síggja teir nokk aftur, tá ið val verður aftur. Sigi bara: Læsið allar hurðar, sigið bert gud forbarmi seg

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.